# Løgmaður ger mun á landsstýrisfólkum



–Tað er bara ein óheftur stovnur, sum kann kanna málið um Annlis Bjarkhamar og landsantikvarin. Alt annað verður litað av partapolitikki, heldur Høgni Hoydal, formaður tjóðveldisfloksins

**– Eg havi ongantíð hoyrt løgmann úttala seg so um landsstýrisfólk hjá fólkaflokkinum, soleiðis sum hann hevur úttalað seg um Annlis Bjarkhamar, sigur Høgni Hoydal, formaður tjóðveldisfloksins**

LANDSANTIKVARURIN
*Áki Bertholdsen*

– Tann einasti, sum kann gera eina haldgóða niðurstøðu um leiklutin hjá Annlis Bjarkhamar, tá ið hon setti landsantikvarin, er ein óheftur stovnur.

Høgni Hoydal, formaður tjóðveldisfloksins, heldur tískil, at tað einasta rætta er at lata Løgtingsins Umboðsmann kanna málið um setanina av nýggjum landsantikvari.

Men hann hevur onga viðmerking, tá ið vit spyrja hann, um at hetta merkir, at hann ikki hevur álit á, at Løgmaður kann koma til eina niðurstøðu, sum er faklig og sostatt eisini partapolitisk óheft.

– Eg haldi bara at tað er bara ein óheftur stovnur, sum kann gera eina álítandi kanning. Tað slepst ikki undan at alt annað verður litað av einum partapolitiskum spæli.

### Løgmaður ger mannamun

Men tað skilst eisini á honum, at hann heldur, at løgmaður ger mannamun á landsstýrisfólkum.

Tí hann leggur afturat, at hann minnist onki til, at Løgmaður hevur úttalað seg um landsstýrismenn hjá fólkaflokkinum, soleiðis sum hann hevur úttalað seg um leiklutin hjá Annlis Bjarkhamar.

– Eg undrist stórliga á úttalililsini hjá løgmanni í hesum máli afturímóti teimum úttalilsum, hann hevur havt í øðrum málum og tað havi eg eisini boðað honum frá.

Høgni Hoydal sigur, at hann hevur eisini sagt við Løgmann, at ynskiligt hevði verið at hann segði tað, hann hevur at siga, við partarnar í málinum, heldur enn av tingsins røðarapalli.

### Skilir ikki

Hann sigur, at hann skilir heldur ikki, at málið um landsantikvarin ikki er lagt fyri Løgtingsins Umboðsmann.

– Og kemur hann til eina niðurstøðu, sum er tyngjandi fyri Annlis Bjarkhamar, er hon til reiðar at taka avleiðingarnar. Tað hevur hon boðað bæði tjóðveldisflokkinum og almenninginum frá.

– Men hon metir seg ikki hava gjørt nakað skeivt. Og tá ið hon heldur tað, fáa vit onki gjørt við málið, ti vit hava ikki innlit í tað.

### Hava ikki broytt kós

Høgni Hoydal leggur afturat, at hann er ikki sinnaður at gera viðmerkingar til tað ítøkiliga málið um landsantikvarin.

Men hann vísir staðiliga tí aftur, sum floksfelagi hansara, Tórbjørn Jacobsen, førir fram í Sosialinum nú í vikuni.

Tórbjørn Jacobsen fýltist á, at tjóðveldisflokkurin ikki fer fram í hesum máli á sama hátt, sum hann er farin fram í øðrum líknandi málum, eitt nú málinum um Signar á Brúnni, tí tá gjørdi flokkurin vart við seg alment.

– Tað er ikki rætt, at vit hava broytt kós og tað kann ein og hvør eftirkannað. Vit hava sagt tað, vit hava at siga á røttum stað og tað gera vit eisini í hesum føri.

– Annars hevur Tórbjørn Jacobsen ikki ført hesi sjónarmiðini fram í flokkinum.

Annars hevur Høgni Hoydal ikki fleiri viðmerkingar til Tórbjørn Jacobsen.

Men hann sigur, at tað hava verið mong slík mál frammi fyrr, men hann hevur ongantíð viðmerkt tey alment.

– Eg hevði onga viðmerking til málið um Jørgen Niclasen, fyrrenn málið kom til viðgerðar í tinginum. Tað sama hevur verið galdandi í øðrum málum, og tann linjan verður hildin, sigur Høgni Hoydal.

### Kannað væl og virðiliga

Tá ið málið um Jørgen Niclasen var fyri, boðaði tú frá, at bara tað, at ivi var sáddur, var nóg mikið til at hann mátti fara frá?

– Tað er beinleiðis skeivt. Málið um Jørgen Niclasen varð kannað í tvey ár. Og tað varð av einum óheftum stovni - og tað var eisini uttan eina einastu viðmerking frá løgmanni.

Og niðurstøðan av kanningini var púra greið, at Jørgen Niclasen var farin út um sínar heimildir.

– Tá ið tað er staðfest, eiga vit at taka tað í álvara og at taka avleiðingarnar.

Og spurningarnir vóru, um Jørgen Niclasen skuldi rættarsøkjast, ella um hann skuldi taka tær politisku avleiðingarnar.

– Og niðurstøðan var, at tað var rætt, at hann tók tær politisku avleiðingarnar, hóast tað eisini varð umhugsað at rættarsøkja hann. Men tað mettu vit kortini ikki vera neyðugt útfrá tí tilfari sum lá í málinum.

At samanbera málið um landsantikvarin við málið um Jørgen Niclasen, kann bara tæna einum partapolitiskum endamáli.

– Tað vera altíð mál, sum skapa øsing í fjølmiðlunum og tað sigur seg sjálvt, at tað kann ikki fáa avleiðingar fyri eitt landsstýrisfólk, bara tí at ein fjølmiðil reisir ein iva. Og higartil er málið um landsantikvarin bara reist í fjølmiðlunum.

Høgni Hoydal leggur afturat, at í teimum málum, sum tjóðveldisflokkurin hevur viðgjørt, hava tað verið óheftar kanningar, sum flokkurin hevur bygt sínar niðurstøður á, antin kanningar hjá landsgrannskoðaranum ella hjá kanningarstjórum.

– Og tí halda vit eisini, at ein óheftur stovnur eigur at kanna hetta málið, sigur Høgni Hoydal.

Og hann heldur, at tað hevur týdning at tað verður gjørt fyri at fáa lýst málið til fulnar.

– Tað kann fáa týdning frameftir og tí hevði tað verið gott at fingið ein óheftan stovn at skorið ígjøgnum.

### Brotið setanarpolitikkin

Høgni Hoydal dugir heldur ikki at siga, um nakar setanarpolitikkur er brotin í hesum føri.

– Eg kann ikki úttala meg um hetta málið, tí eg kenni tað ikki.

– Men eg havi sjálvur gingið ímóti meirilutanum í einum setanarbólki.

Høgni Hoydal sigur, at yvirhøvur er tað so, at tað er ikki embætisverkið, sum skal seta týdningarmikil størv.

– Vit hava landsstýrismannaábyrgd og vit hava eina fyristingarlóg. Og tað er landsstýrismaðurin, sum setir størv og sum hevur ábyrgdina av teimum fólkum, hann setir í starv.

– Men tað, sum landsstýrismaðurin hevur brúk fyri, er, at embætisverkið gevur honum eitt haldgott grundarlag at taka støðu útfrá og gevur honum greiðar metingar av førleikunum hjá teimum ymsu umsøkjarunum.

– Tá ið landsstýrismaðurin hevur fingið eitt haldgott grundarlag, ger hann sínar niðurstøður og setir eitt starv.

– Men hann skal hava góðar grundgevingar fyri tí, hann ger, sigur Høgni Hoydal



**NØVN Í VIKUNI**

## Skipbrot í Miðalhavinum

**Øll manningin upp á sjey mans varð bjargað í øllum góðum, tá danska farmaskipið "Karin Cat" gekk burtur í Miðalhavinum mikumorgunin. Skipari var Erik Lund Eriksen í Havn**

SKIPBROT
*Magnus Gunnarsson*



*Erik Lund Eriksen skipari á danska farmaskipinum Karin Cat*

Veðrið var ringt, tá danska farmaskipið "Karin Cat" gekk burtur í Miðalhavinum mikumorgunin, 400 km sunnanfyri Sicilien. Skipið sendi út neyðarkall kl. 7.30 og ein tíma seinni fór manningin í bjargingarbátarnar. Manningin bleiv tikin upp av einum maleiskum skipi, sum settu teir av í Alexandria í Egyptalandi. Skipari var Erik Lund Eriksen, sum býr í Bóndabrekku í Havn.

Danska reiðaríið J. Poulsen Shipping A/S eigur og rekur skipið. Skipið var á veg frá Italien til Oman við eini tungari konstruktión til eitt oljureinsivirki, tá lastin forskjeyt seg, og hol kom á skipið. Sjógvur streymaði inn, og skipið fekk stóra slagsíðu. Karin Cat sakk ikki beinanvegin.

## Annita í barnsburðarfarloyvi



Tingkvinna Tjóðveldisfloksins, Annita á Fríðriksmørk, fór í gjár í barnsburðarfarloyvi úr løgtinginum.

Tað hendir ikki ofta, at »tingmenn«, sum tað eitur samb. stýrisskipaninin, fara í barnsburðarfarloyvi, men hetta er so aðru ferð, at Annita á Fríðriksmørk roynir hetta.

Hon hevur sum øll onnur á arbeiðsmarknaðinum rætt til barnsburðarfarloyvi. Tingfólk, sum fara í barnsburðarfarloyvi, missa hvørki løn ella eftirlønaraldur meðan tey eru í farloyvi.

## Eyðun Christiansen settur í starv hjá Føroya Kommunufelag



Eyðun Christiansen í Havn er settur í starv hjá Føroya Kommunufelag. Eyðun hevur lisið samfelagsfrøði, og kemur hann at taka sær av málum sum koma til felagið. Hann er 36 ára gamal, sonur Poulu og Hans J. Christiansen í Havn. Nýggjur formaður í Føroya Kommunu felag er Mia Pedersen í Vestmanna, hon tók við eftir Jacob Vestergaard, ið bleiv settur sum landsstýrismaður seinasta mánadag.

## Finnur Helmsdal á ting

Finnur Helmsdal telist nú aftur millum tjóðveldismanningina á tingi – fyribils.

Hann sat á tingi seinasta valskeið sum varamaður fyri Høgna Hoydal, men við løgtingsvalið í fjør var hann tvær atkvøður ov stuttur, og tí fór Jógvan Arge við varasessinum hesaferð.

Finnur Helmsdal er sonur Oliviu og Mikkjal Helmsdal, fyrrv. landsverkfrøðing. Hann er giftur Jónrun Højgaard. Finnur er útbúgvin sosialráðgevi, og hevur starvast sum sosialráðgevi á Almannastovuni, og hann hevur verið leiðari á Andveikraverndini.

Finnur Helmsdal er nú leiðari á Føroya Barnaheimi.

Á løgtingsvalinum seinast fekk Tjóðveldisflokkurin trý umboð vald á ting,



Høgna Hoydal, sum fekk 1.351 atkvøður, Annita á Fríðriksmørk, sum fekk 405 atkvøður og Kristinu Háfoss, sum fekk 364 atkvøður. Jógvan Arge fekk 205 atkvøður og Finnur Helmsdal fekk 203.

Finnur hevur sæti á tingi, til Annita á Fríðriksmørk boðar tingini frá, at hon tekur sæti aftur.

## Bisty í nýggj høli

**Bókhaldsstovan Bisty við Hildur Gunnarsdóttir er flutt í nýggj høli á Gørðunum í Vági. - Eg vildi m.a. sleppa undan at koyra um Hovsegg, sigur Hildur Gunnarsdóttir**

FLYTING
*Dagfinn Olsen*



*Hildur Gunnarsdóttir á nýggju skrivstovuni hjá Bisty. Vinnie starvast eisini á skrivstovuni og ein dóttir Hildur er eisini í starvi, men gongur í løtuni í skúla í Havn*

*Mynd: D. Olsen*

Eftir at hava húsast á Tvøroyri, er bókhaldsstovan Bisty nú flutt í nýggj høli í Vági. Nýggu hølini eru á Gørðunum í Vági.

– Eg vildi m. a. sleppa undan at koyra um Hovsegg, sigur Hildur Gunnarsdóttir, sum leggur afturat, at brúk altíð er fyri hølum, og at heilsuskúlin nú fer at nýta hølini á Tvøroyri.

Á Bókhaldsstovuni Bisty starvast trý fólk, og tey hava nógv at gera. Umframt Hildur eru tvey fólk í starvi, m.a. dóttir hennara, sum í løtuni gongur í skúla í Havn.

Hildur Gunnarsdóttir hevur ymisk álitisstørv og er nevndarlimur í Fíggjargrunninum frá 1992.

## Victor Nielsen HD prógv í roknskapi

Victor Nielsen, skásettur grannskoðari í Klaksvík, hevur lokið HD prógv í roknskapi á Handilsháskúlanum í Århus. Victor, ið er 41 ára gamal, varð útbúgvin bókhaldari í 1981, tók hægri handilsskúlaprógv í 1983, starvaðist á grannskoðaravirkinum hjá Jógvan Sundstein frá 1983-86 og var m.a. roknskaparleiðari hjá Føroya Fiskavirking í Fuglafirði frá 1992-95. Victor gjørdist skrásettur grannskoðari í 1995 og yvirtók samstundis bókhalds- og grannskoðaravirkið Føroyabók í Klaksvík.

